Sigurin hesa ferð rokna tær sum hjáveiðu

Stóra málið hjá kvinnunum umborð á Jarnbardi er at vinna á Ólavsøku, men tað kom ikki óvæntað á tær, at tað eydnaðist at vinna í Sandvági

6–MANNAFØR KVINNUR
Jóannes Hansen

– Eg haldi ikki, at tað royndist so væl hjá okkum í fyrstu tøkunum, eftir at vit vóru startaðar. Men eftir tey fyrstu tíggju fimtan tøkini vóru vit frammanfyri, sigur Jannie Dam Jacobsen Mynd: Álvur Haraldsen

Stóra málið hjá kvinnunum umborð á Jarnbardi hevur verið, at tær skulu vinna á Ólavsøku. Soleiðis er tað framvegis, men sjálvandi fegnast tær um, at tað eydnaðist at koma fyrstar á mál longu á Vestanstevnuni:

– Í Fuglafirði vóru vit tætt við. Tá vóru vit 6/25 av einum sekundi aftanfyri Gongurólv. Vit roknaðu tað at vera longdina á einum bláanti ella lítið meiri enn tað. So vit høvdu gott mót, tá ið vit fóru vestur í Vágar, tí nú høvdu vit vant tríggjar ferðir afturat. Tað eydnaðist at vinna, og vit eru sjálvandi ovurfegnar yvir, at tað gekk so væl, men eingin skal ivast í, at stóra málið hjá okkum er at vinna ólavsøkuróðurin. Har verður tað avgjørt, um stutta kappingarárið hjá okkum verður væl eydnað ella ikki.

Tað er Jannie Dam Jacobsen, sum vit tosa við. Hon er stýrimaður og bátsformaður umborð á Jarnbardi. Tað hevur hon verið í fleiri ár. Tær vunnu FM í fjør og eisini í 1997, 1999 og í 2000. Í ár høvdu tær ikki umstøður at vera við í teimum fyrstu róðrunum, men nú líkist manningin heilt nógv henni, sum í 2000 vann FM. Á Vestanstevnu vóru allar tær somu við sum í 2000 uttan ein.

– Tá ið vit mannaðu bátin undan Sundalagsstevnuni var tað meiri fyri stuttleikar. Undan Jóansøkuni skiftu vit tvær út, og aftaná Jóansøkuna skiftu vit aftur tríggjar út. Tær, sum síðani eru komnar umborð, eru royndir rógvarar. Fleiri av teimum búgva niðri og eru heima í summarfrí. Síðani eftir Jóansøkuna hava vit tikið venjingina í stórum álvara. Tað hevur gingið væl. Vit vóru nær við at vinna í Fuglafirði, tað eydnaðist hesa ferð, og vit ætla okkum heilt víst at vinna á Ólavsøku, sigur bátsformaðurin avgjørdur.

Tær, sum mannaðu Jarnbard í Sandvági, vóru Jannie Dam Jacobsen – Rannvá Eiriksdóttir, Signhild Petersen, Svanna Jákupsdóttir, Eivy Olsen, Brynhild Klein og Rannvá Jacobsen. Í fjør vóru fýra at teimum vit til at vinna FM – Jannie, Eivy, Brynhild og Rannvá.

Næstan beinanvegin fremstar

Jannie Dam Jacobsen ásannar, at umstøðurnar at rógva í Sandvági vóru øðrvísi, enn tær hava verið í hinum kappingunum.

– Lotið og aldurnar lógu inn á síðuna úti á málinum. Tað var torført at halda seg til tað, sum vit frammanundan høvdu ætlað. Tá ið vit spurtaðu, bar tað hjá summum til at seta føtur í bekk, men tað vóru ikki allar, sum fingu føturnar upp av lunninum. Á seinna partinum av málinum var tað meiri undan. Tá bar tað til so at siga at ríða á aldunum. Tað eydnaðist onkra ferðina, men so lúrdi vandin fyri at enda í aldudalinum, og tá kendist tað næstan, sum um báturin stóð stillur.

Kendi tú tað soleiðis, sum um tit stýrdu kappingini alla tíðina?

– Eg haldi ikki, at tað royndist so væl hjá okkum í fyrstu tøkunum, eftir at vit vóru startaðar. Men eftir tey fyrstu tíggju fimtan tøkini vóru vit frammanfyri. Kappingin var alla tíðina stór frá bæði Páll Fanga og Gongurólvi, men eg haldi, at tað kom ikki fyri, at hinir bátarnir vóru frammanfyri okkum. Munurin var stuttur, men tá ið vit hoyrdu fyrsta skotið, var eg púra sannførd um, at vit høvdu vunnið, sigur royndi stýrimaðurin umborð á Jarnbardi.

Hóast manningin hevur nógvar royndir og hevur vunnið nógv, so var hetta fyrsta ferðin, at tær vunnu við nýggja bátinum, sum Knørrafelagið hevur fingið í ár. Tí spyrja vit, um tað er munur á, hvussu bátarnir skikka sær.

– Tað er tað heilt víst. Fyri at fáa nýggja bátin at ganga væl, so er neyðugt at vera nógv friðarligari umborð, enn tað var á hinum bátinum. Nýggi báturin er rankari, og hann tykist tola minni av, men hann gongur væl, tá ið vit fara við honum, sum vit skulu.

Blandað manning

Næstu kappingarneytarnir hjá Jarnbardi í Sandvági vóru FM manningin á Gongurólvi og tær umborð á Páll Fanga. Tær í Klaksvík vunnu ta kappingina, og harvið endaði Gongurólvur á triðja plássinum í fyrsta róðrinum í ár, sum tær ikki vunnu. Men tað er greitt, at tær hava vunnið FM heitið, hóast tað framvegis er møguleiki fyri, at onkur annar bátur kann vinna sjey stig á Ólavsøku. Eingin ivi man kortini vera um, at tær umborð á Gongurólvi fara at gera alt, sum tað ber til, fyri at vinna síðsta róðurin. Nú hava tær tvær vikur at fyrireika seg til ta kappingina í.

Fyrr í ár skuldi tað eitast, at manningin á Jarnbardi, sum vann FM kappingina í fjør, var á Scilly oyggjunum og kappaðist. Men tað vóru bara tvær av Jarnbardi við í tí kappingini. Afturat teimum vóru fimm aðrar, sum tær umborð á Jarnbardi nú kappast við av øllum alvi, men sum tær tá fingu at hjálpa sær. Talan var um rógvarar umborð á Gongurólvi, Páll Fanga og Riddaranum.

Í Sandvági hekk Lómur leingi uppi í oddastríðnum, men argjakvinnurnar noyddust at sleppa síðsta partin av teininum. Munurin á málinum millum Jarnbard og Páll Fanga var ein lítil bátslongd, munurin millum Páll Fanga og Gongurólv var so at siga eingin, og fjarstøðan millum Gongurólv og Lóm var 2–3 bátslongdir. Smyril kom einsamallur á mál, og Fuglfirðingur vann tøttu kappingina við Fortunu um at sleppa undan aftasta plássinum.

Sílið fann aftur á rætta lagið

Eftir tvær ferðir at hava ligið undir fyri vestmenningum, vunnu dreingirnir hjá Havnar Róðrarfelag aftur, og nú eru teir stórfavorittar at vinna FM heitið

5–MANNAFØR DREINGIR
Jóannes Hansen

Tað er heilt víst, at Sílið fer at vinna í Sandvági. Tað ljóðaði millum róðraráhugað, sum undan Vestanstevnuni høvdu fylgt við venjingunum á Havnarvág, har ein stórur partur av kappróðrarmanningunum venja. Og spádómurin gjørdist til veruleika. Sílið vann rættuliga sannførandi. Tað var gott og væl leyst aftur til Havfrúnna, sum hevði vunnið teir báðar undanfarnu róðrarnar.

Tjaldrið royndi at halda seg til á fyrstu metrunum, men tað var skjótt greitt, at kappingin um fremsta plássið bara fór at standa millum Sílið og Havfrúnna, og soleiðis varð tað. Men vestmannadreingir megnaðu ikki at halda tørn, og so vann Sílið sera sannførandi.

Hava tit skift fólk, síðani tað nú aftur gekk so sera væl, spyrja við bátsformannin á Sílinum, Sigtór Lützen, og hann svarar soleiðis:

– Nei, vit hava akkurát somu manning. Men vit hava lagt rógvingina eitt sindur um. Hvat vit hava gjørt, leggi eg ikki í at siga nakað um, men vit hava verið rættuliga miðvísir í venjingini, sum Hallgrím Joensen, ið áður hevur verið við bæði Havnarbátinum og Ørvi, hevur hjálpt okkum við. Men tað var neyðugt at gera okkurt við tað. Havfrúgvin so smurdi okkum av á Jóansøku. Í Fuglafirði var munurin lítil og eingin. Vit høvdu gott mót, tá ið vit fóru vestur í Vágar, og tað gekk rættuliga væl.

Kendu tit tykkum darvaðar av, at tað ikki var heilt slætt?

– Tað bilaði ikki. Tað ráddi um at fáa nyttu burturúr, tá ið vit vóru á aldukambinum. Tá tittaðu vit, men tað haldi eg, at allir gjørdu. Men tað var eitt sindur øðrvísi, enn tað plagar at vera, staðfestir væl nøgdi bátsformaðurin á Sílinum.

Blikur og Tjaldrið kappast um bronsukrónurnar. Hesa ferð var Tjaldrið frammanfyri, men kappingin er tøtt, og tann av hesum báðum, sum verður fremri á Ólavsøku, fer at vinna bronsu.

Orduligt FM heiti

Í FM kappingini skal tað vilja heilt illa til hjá teimum á Sílinum, um teir ikki skulu vinna FM. Sílið er fimm stig frammanfyri Havfrúnna.

FM heitið má metast at vera meiri enn á stokkinum?

– Tað fært tú meg ikki at siga, men vit liggja væl fyri. Undir venjing undan Jóansøkuni brotnaði ein ár hjá okkum. Okkurt sovorðið kann koma fyri, men um einki óvæntað hendir undir róðrinum, so vinna vit FM á Ólavsøku, heldur Sigtór Lützen, men hann leggur afturat, at øll FM heiti smakka ikki eins væl:

– Í fjør var eg við Sílinum, og vit vunnu FM. Men Tjaldrið vann á Ólavsøku. Sjálvandi vóru vit fegnir um FM heitið, men vit kendu tað soleiðis, at tað hevði verið nógv stuttligari, um vit eisini høvdu vunnið á Ólavsøku. So vit hava nógv at stríðast fyri um fjúrtan dagar. Hesa ferð ætla vit okkum at vinna alt. Men tað verður kapping um fremsta plássið á Ólavsøkuni. Tað vita vit.

Ørvur er bestur av øllum

Mest sannførandi vinnarin av øllum í Sandvági var Ørvur. Hann var meiri enn eina bátslongd frammanfyri næstu kappingarneytarnar, og harvið vann 8–mannafarið hjá Havnar Róðrarfelag meistaraskapin við maner

Mynd: Álvur Haraldsen

Eftir sætta sigurin í seks kappingum bendir alt á, at 8–mannafarið hjá Havnar Róðrarfelag verður fyrsti báturin yvirhøvur, sum fer at vinna sjey FM róðrar í einum og sama ári

8–MANNAFØR
Jóannes Hansen

Mest sannførandi vinnarin av øllum í Sandvági var Ørvur. Hann var meiri enn eina bátslongd framman fyri næstu kappingarneytarnar, og harvið vann 8–mannafarið hjá Havnar Róðrarfelag meistaraskapin við maner. Ørvur hevur fult stigatal, og hann er fjúrtan stig frammanfyri næsta bátin. Tað ber ikki til at tosa um nakran kappingarneyta hjá Ørvi.

At tað kiksaði hjá kvinnunum umborð á Gongurólvi í Sandvági hevur við sær, at tað nú bara er Ørvur, sum hevur vunnið allar róðrarnar í hesum kappingarárinum. Tað er ilt at ímynda sær nakran annan vinnara í ólavøkuróðrinum enn Ørv, og harvið verður hann bæði besti kappróðrarbáturin yvirhøvur í ár, samstundis sum hann verður fyrsti báturin yvirhøvur, sum vinnur sjey róðrar í einum og sama ári. Talan er jú um fyrsta árið, har tað eru sjey FM róðrar á skránni.

Knørrur legði bragdliga fyri. Tað kendist sum um teir umborð á 8–mannafarinum hjá Knørrafelagnum ætlaðu ikki at standa aftanfyri 6–mannafarið bæði við kvinnum og monnum hjá sama felag, sum vunnu sínar kappingar. Knørrur var tað mesta av einari hálvari bátslongd á odda eftir fyrsta spurtin, og munurin aftur til næstu bátarnar hevði hug at leingjast eina løtu.

Men tað skaladi ikki teir umborð á Ørvi, at teir ikki fingu besta startin. Sjálvsálitið er, sum tað skal vera, og tað er væl skiljandi. Ørvur helt seg til sítt. Áralagið var, sum tað plagar at vera, taktikkurin var, sum hann plagar at vera, og tá ið róðurin var einar trý hundrað metrar gamal, fór tað at líkjast tí, sum tað hevur verið allar hinar ferðirnar. Ørvur tók Knørr, sum kortini ikki datt heilt afturav. Knørrur var støðugt við í kappingini um næstu plássini, og á málinum var munurin frá fjórða plássinum hjá teimum og fram til næsta bátin ein evarska lítil hálvur skutur.

Ørvur vann sannførandi, og kappingin var bara um næstfremsta plássið og harvið telving um undan Ólavsøku at liggja best fyri í kappingini um silvurkrónurnar. Argjabáturin var drúgvastur í kappingini við Kvívíkingin og Knørr, men munurin var rættuliga lítil. Frá Argjabátinum á næstfremsta plássinum og aftur til Knørr á fjórða plássinum var munurin minni enn ein hálv bátslongd, og inn ímillum teir báðar kom Kvívíkingurin á mál.

At Argjabáturin var frammanfyri Kvívíkingin ber við sær, at teir á Argjum nú hava bestu silvurkortini á hondini. Um plaseringarnar á Ólavsøku verða, sum tær hava verið higartil, so verður Argjabáturin næstbestur, sjálvt um tað skuldi tørnað soleiðis út, at Kvívíkingurin verður frammanfyri nummar tvey og Argjabáturin nummar trý í síðsta róðrinum. At Ørvur fer at vinna á Ólavsøku, er tað neyvan nakar ivi um.

SKRIVSTOVUHØLIR Í SALTANGARÁ

Á Heiðavegi 15 í Saltangará eru nýggj skrivstovuhølir tøk til leigu frá 1. august.

Talan er um 2x50 fermetrar á miðhæddini og 70 fermetrar á loftshæddini. Harafturat koma kopirúm, goymslurúm og toilet til hvørja skrivstovu.

Áhugaði kunnu síggja hølini við at venda sær til:

ERO P/f, tel 44 96 12